# Bygdafólk vælkomin til Havnar á ólavsøku

**Bygdirnar eru sum bistandsklientar, og tað er ikki rætt at geva teimum andahjálp, metir bersøgni havnarmaðurin Ingi Sørensen. Hann gjørdist landskendur, tá hann luttók í sjónvarpsrøðini *Fólksins Rødd*, har hann førdi seg fram sum havnarmann við sterkum meiningum um bygdirnar og bygdamenning. Men Ingi letur ongan iva vera um, at bæði bygdafólk og útlendingar eru vælkomin til Havnar á ólavsøku**

**Dagfinn Olsen**

Ingi Sørensen var fyrr kendur sum tónleikari, trailaraførari og havnarmynd. Seinnu árini hevur stilli verið kring Inga, sum umframt at arbeiða sum lívbjargari í svimjihylinum í Havn, eisini er vinnukavari. Og hann er nógv undir vatnskorpuni, har hann serliga hevur gjørt vart við seg sum ein sera dugnaligur myndamaður, ið tekur myndir av havdjórum og plantum.

Men Ingi kom aftur undan kavi. Og tað gjørdi hann við manér, og nú kenna øll Inga Sørensen. Fólksins Rødd setti veruliga havnarmannin á breddan, og fólk – kanska serliga bygdafólk – høvdu úr at gera við at kjakast um Inga, og hansara bersøgnu útsøgnir um barnauppaling, og ikki minst Havnina og bygdirnar. Klaksvíkingar tóku enntá og leiktu Inga í norðoyastevnuteitinum í ár, Øska á Lakkinum, har teir leiktu hendan mannin, ið hevði sítt egna »inga-mál«.

## Børnini

– Tað fyrsta, eg hugsi um, tá tú sigur ólavsøka, er at býurin er fullur av fólki. Og tað er fantastiska deiligt at ganga oman og niðan og hitta fólk, sigur Ingi Sørensen.

– Men ólavsøkan er fyri børnini, og har hugsi eg um, at tað er ikki rætt at mergsúgva børnini við øllum teim mongu og dýru tilboðunum, so sum hoppiborgir og annað. Og hoppiborgirnar eru ikki vandaleysar heldur, sigur Ingi.

– Børnini áttu at sloppið bíligari á ólavsøku. Foreldur mugu siga, at børnini fáa bara so og so nógv, tí alt er so kostnaðarmikið. Ólavsøkan er stutt sagt ov handilslig, men har veit eg, at borgarstjórin hevur arbeitt við hesum spurninginum, so kanska er vón fyri framman, metur Ingi Sørensen.

Sjálvur hevur hann í nøkur ár saknað at síggja kapppróðurin av bryggjukantinum saman við øllum teim føroyingum, ið har savnast. Ingi hevur nevniliga í nøkur ár verið froskmaður undir kappróðrinum og hevur ligið á vágni og upplivað ólavsøkukappróður.

Ingi fegnast tó um, at fólk uppføra seg betri á ólavsøku nú, í mun til fyrr.

– Fyrr gingu menn skít á ólavsøku, men hetta sær ein næstan ikki longur. Vit eru blivin meira búgvin, heldur Ingi Sørensen.

## Bygdafólk vælkomin

Men Ingi Sørensen letur ongan iva valda um, at bygdafólk eru vælkomin til Havnar á ólavsøku.

– Eg eri Havnarmaður við stórum H, men hatta við bygdamonnum í sjónvarpssendingini er sjálvsagt bara skemt. Men hinvegin er tað ikki skemt, tá tosað verður um politikarar og at flyta stovnar út á bygd, staðfestir Ingi Sørensen.

– Eg eri ímóti at flyta almennar stovnar á bygd, og tað er ikki rætt at flyta ymiskt úr Havn. Tað kann ikki vera rætt at pilka burturav høvuðsstaðnum, at petta alt sundur, ella sum eg segði í sendingini; at flyta 1000 havnarmenn fyri at skapa nøkur arbeiðspláss á bygd. Hetta snýr seg í veruleikanum um politikarar í Havn, sum ikki hava rygg, men heldur logra við halanum, sigur Ingi Sørensen.

– Eg eri ikki fyri at flyta almennar stovnar út á bygd, yvirhøvur ikki, men um tað loysur seg, kunnu bygdirnar fáa deildir av stovnum, sum eru teimum viðkomandi. Ongin Havnarmaður skal noyðast út á bygd at gera síni ørindi, sigur Ingi Sørensen

## Bygdir í kuvøsutilstandi

– Tað snýr seg um, at finnast má uppá okkurt nýtt á bygd, heldur enn at fyta ymiskt úr Havnini. Okkurt nýtt má skapast á bygd, ið ber seg. Annað setir bygdirnar í kuvøsutilstand, og tær fáa andahjálp. Tað er ikki rætt at flyta alt úr Havn. Hetta ger bygdirnar til bistandsklientar, ið fáa andahjalp, metir Ingi Sørensen, sum torir at siga sína hjartans meining, og sum ilskast inn á, at føroyingar ikki tora at siga sína meining.

– Tað er so typiskt føroyskt, at fólk ikki tora at siga sína meining. Og alt hetta við bygdamenning, ...ja, eg veit ikki, men eg haldi, at rættast er at skapa okkurt nýtt á bygd, heldur enn at flyta ymiskt úr Havn, sigur Ingi Sørensen.

## Óbeskriviliga góð

Sum havnarmaður gleðir Ingi seg til ólavsøku.

– Eg havi nógv sera góð minnir frá bygdastevnum fyrr í tíðini. Fólk á bygd vóru sera blíð og vinarlig ímóti okkum havnarungdómum, tað vóru tíðir! Nú eru alt ov nógvar stevnur, og tað má vera sera strævið, at vera kappróðrarfólk í 2010, metir Ingi Sørensen.

– Ólavsøkan er fyri allar føroyingar. Men veðrið hevur nógv at siga. Men tá veðrið er gott, so er ólavsøkan óbeskriviliga góð. Og bygdafólk eru meira enn vælkomin til Havnar á ólavsøku. Og tað sama er galdandi fyri útlendingar, sigur Ingi Sørensen.

***Tað er ikki rætt at flyta alt úr Havn. Hetta ger bygdirnar til bistandsklientar, ið fáa andahjálp.***

*Mynd: Símun J. Hansen*